So vann Aarhus Fremad

Tað hevur gingið heilt illa hjá Aarhus Fremad seinastu vikurnar. Liðið hjá Krzysztof Popczynski tapti heili 7-0 seinasta vikuskiftið, men í gjár gekk betur, tá ið Aarhus Fremad hevði vitjan av teimum næstbestu hjá AaB. Eitt mál kom í dystinum, og tað skoraði Brian Johansen fyri Aarhus Fremad, tá ið eitt korter var eftir at spæla.

Ronaldo: Ferguson er sum ein pápi

Cristiano Ronaldo staðfestir nú enn einaferð, at hann ætlar sær at halda fram við at spæla fyri Manchester United, hóast hann javnan verður settur í samband við Real Madrid. – Manchester United mítt heim. Hjartað hjá mær liggur her, og tað er her, eg vil spæla. Venjarin hevur verið sum ein pápi fyri meg, síðani eg flutti til United at spæla, sigur Ronaldo við News of the World.

HB-KÍ 4-2 (2-0):

Klassamunur í klassikara

HB

KÍ

At tað ikki er av tilvild, at HB er oddalið í Vodafonedeildini, setti liðið eina tjúkka striku undir í gjár, tá KÍ var á vitjan í Gundadali. Í løtum sá tað út sum »men against boys«, men tað tók tíð hjá HB at fáa hol á. Áðrenn tað hendi, mátti KÍ brenna eitt brotsspark, men so hugdi HB heldur ikki aftur um seg aftur í hasum dystinum

FÓTBÓLTUR

Hilmar Jan Hansen
einslistir@kallnet.fo

Fortreytirnar hjá liðunum vóru sera ymiskar undan dystinum. HB var oddalið og KÍ botnlið, og tann støðan hevði ikki flutt seg nakran veg, tá dysturin var liðugur – heldur tvørturímóti. HB styrkti sína støðu sum oddalið, tí NSÍ samstundis tapti, og hjá KÍ gjørdist vegurin upp um niðurflytingarstrikuna enn longri, tí ÍF á triðniðasta plássi fekk stig. Og so hjálpti tað einki, at 07 Vestur heldur einki fekk hetta umfarið.

At hetta skuldu verið tey bæði størstu feløgini í føroyskum fótbólti gjøgnum allar tíðir, sást slett einki til. Ikki tí, HB livdi upp til, ið væntast kundi av oddaliðnum, hóast verjuspælið enn kann gerast munandi meira sannførandi, men KÍ livdi ikki upp til annað enn tað, liðið er: Eitt botnlið!

Tað gingu 41 minuttir, áðrenn nakað mál kom, men afturfyri fingu heimaáskoðararnir tvey at fegnast um, so tí var dagsskráin endaliga skorin út í relieff longu fyri steðgin. Áðrenn tað hendi, mátti KÍ brenna eitt brotsspark, men so hugdi HB heldur ikki aftur um seg aftur í hasum dystinum.

Fylgdu lagdari ætlan

Besta spælið hjá HB var henda dagin ta fyrstu løtuna, tá spælararnir sóu út til at fylgja til fulnar einari lagdari ætlan fyri, hvussu trýst skuldi leggjast á KÍ. Bólturin var alla tíðina inni á hálvuni hjá gestunum og var fluttur skjótt aftur og fram, út í síðurnar, inn á miðjuna aftur og so enn eina ferð út í vøllin, so KÍliðið ta fyrstu løtuna einki annað gjørdi, enn at renna aftaná.

Tað einasta, sum ikki kom hesa løtuna, var eitt mál, tí innleggini vóru ov óneyv og tí annaðhvørt ein fótur ella eitt høvd hjá KÍ kom fyri, tá avgerandi sparkið ella skallarin skuldi gjøgnumførast. So við og við linkaði HB-trýstið, og menn sóu út til at leita sær eftir øðrum møguleikum, enn avtalað hevði verið frammanundan.

Hetta gjørdi samstundis, at KÍ fekk fleiri og fleiri høvi at sleppa upp í part, og tað tænir gestunum til rós, at teir eftir besta førimuni royndu at taka av. Eftir ein hálvan tíma broyttist myndin í eina løtu, har KÍ hevði bóltin nógv, og burtur úr tí spurdist eisini størsti møguleikin higartil í dystinum, tá Erland B. Danielsen var feldur í HB-brotsteiginum og KÍ fekk brotsspark.

Heðin á Lakjuni var settur at skjóta, men tað eydnaðist ikki at lumpa Símun Rógva Hansen í HB-málinum, sum tveitti seg rætta vegin og fekk vart fyri. Hetta tók sjónliga pippið frá KÍ-arunum, og so hendi tað, sum so ofta er sað fyrr, at fáar minuttir seinni hevði hitt liðið lagt seg á odda – ikki bara 1-0, men enntá 2-0.

Greiður klassamunur

Sum nevnt omanfyri, livdi HB stórt sað upp til tað, ið ein kann vænta sær av einum oddaliði á heimavølli, men verjuparturin var ikki nøktandi alla tíðina. Eitt dømi um tað var støðan, tá KÍ fekk brotssparkið, men eisini í øðrum førum kundi KÍ, uttan at vera so øgiliga álopshugað, seta eitt ávíst trýst á aftastu ketuna hjá HB.

Hetta sást millum annað, tá KÍ fekk minkað um munin, og eisini í øðrum førum tóktist verjuparturin hálvhjartaður hjá heimaliðnum, ið tó kundi dúva søttliga upp á álopspartin, ið var fleiri ljósár framman fyri tann hjá KÍ. Og tað er eingin ivi um, at høvuðsorsøkin til, at HB er oddalið, er ein arbeiðssamur miðvøllur og eitt avgjørt álop, ið megnar at skjóta málini, ið krevjast.

Málini kundu enntá verið fleiri í tali, um álopsparturin gjørdi sær størri ómak, men hetta var helst heldur ikki dysturin, har tað kravdust so nógv fleiri mál, tí tey fýra vóru ríkiligt til at vinna dystin, hóast KÍ tvær ferðir fekk spílað HB-meskarnar.

Eftir stóðst tú við kensluni av, at hóast KÍ mynstrar við sínum kanska yngsta liði nakrantíð, so var hetta í yvirskipaða høpinum eitt møti millum framtíð og fortíð, har HB sær meira út til at vera á veg fram sum uppaftur størri stórmakt í føroyskum fótbólti, meðan dagarnir hjá KÍ á tí økinum munnu vera taldir. Í øllum førum var hesa ferð greiður klassamunur á liðunum í gamla klassikaranum, ið nokk seint aftur verður tað, hann eina ferð var.

Andrew av Fløtum skoraði tvey av málunum hjá HB ímóti KÍ, harav tað seinna var ein perla, ið veruliga staðfesti, at maðurin dugir meira enn teir flestu, tá umræður at gera arbeiðið til lítar sum áleypari
Mynd: Hilmar Jan Hansen/Einslistir

Málini

1-0, 41. min.: Fróði Benjaminsen smekkar á stongina, og tá bólturin kemur útaftur, er Hans á Lag fyrstur á og sendir í málið.
2-0, 45. min.: Andrew av Fløtum verður sendur avstað í vinstru síðu og letur bóltin springa eina ferð, áðrenn hann smekkar til úr lutfalsliga spískum vinkli.
3-0, 49. min.: KÍ-verjan er um ein háls og sendir bóltin inn fyri aftur egið mál, og so er Páll Mohr Joensen avgjørdur, tá bólturin støkkur til hansara.
3-1, 53. min.: Innskifti Kristoffur Jacobsen rennur HB-verjuna av og er ósvikaliga tryggur, tá hann verður einsamallur við HB-málverjanum.
4-1, 68. min.: Andrew av Fløtum temur eina góða, langa sending við bringuni og fluktar bóltin flott undir yvirleggjaran, úti við stongina. Ein sonn perla!
4-2, 84. min.: Eftir hornaspark kemur Sørmund Kalsø í góða skotstøðu og fær avgjørdur pyntað um úrslitið.

Brotssparkið vakti okkum

– Vit fingu fýra væl uppborin mál, men tað er øgiliga keðiligt, at teir fáa tvey mál, tí vit vóru betra liðið í dag, segði Andrew av Fløtum, sum sjálvur gjørdi sín part, tí hann skoraði tvey av málunum hjá HB í Gundadali ímóti KÍ.

– At Símun Rógvi bjargaði brotssparkinum hjá teimum, var sum ein útpurring fyri okkum, tí vit høvdu spælt rættiliga væl, men komu ikki til teir heilt stóru møguleikarnar. Men at vit so fáa tvey mál fyri steðgin, er øgiliga avgerandi.

HB er eftir fyrsta triðingin av landskappingini fimm stig framman fyri nummar tvey, og Andrew fegnast um, at liðið í ár hevur fingið eina góða byrjan, tí so plagar ikki altíð at vera hjá HB:

– Tað hevur fløskað seg øgiliga væl hjá okkum, og vit hava fingið eina øgiliga góða byrjan. At hini liðini so hava verið ófør at sett stig til, ger ikki støðuna verri hjá okkum, so vit eru væl nøgdir við, hvussu tað hevur gingist higartil, segði Andrew.

– Í dag kundu vit fegnast um, at vit spældu rættiliga væl í dag, so áskoðararnir fingu nakað fyri pengarnar.

hil